James Efstathiou frá Norsk Hydro:

Skilagott av føroyingum at lodda dýpið nú

Ein stórur partur av føroyska landgrunninum er áhugaverdur, men serliga tann parturin, sum er sunnan fyri 63 stig og eystanfyri sigur kanningarstjórin hjá Norsk Hydro

Oljufeløg, sum Sosialurin hevur tosað við, taka sum heild væl ímóti ti innbjóðing, sum føroysku oljumyndugleikar hava sent út til teirra um at siga frá, hvørji øki tey meta vera áhugaverd á føroyska landgrunninum.

Eitt av feløgunum, sum er við í leitingini eftir olju og gassi við Føroyar, er Norsk Hydro. Felagið er við í samtaki saman við teimum trimum feløgunum Amerada Hess, Dong og Lasmo.

James Efstathiou, kanningarstjóri hjá Norsk Hydro sigur við Sosialin, at hetta stigið frá føroysku myndugleikunum er skilagott.

Eg skilji væl, at føroysku oljumyndugleikarnir – nú eina tíð áðrenn fyrsta útbjóðingarumfarið fer av bakkastokki, vilja vita, hvat oljufeløgini halda.

James Efstathiou váttar, at dagurin fyri fyrstu lisensrundu er broytt hetta seinasta árið, men hetta kemur ikki óvart á hann. Hetta er nakað, sum teir hava tikið hædd fyri og roknar hann heldur ikki við, at startskotið verður fyrr enn móti endanum av 97 ella í byrjan av 98, soleiðis at loyvini kunnu gevast seinni í 98. Hetta er innan fyri tann karm, ið vit hava roknað við, sigur hann.

James Efstathiou, kanningarstjóri hjá Norsk Hydro

Ikki teigar men øki

Uppá fyrispurning um Norsk Hydro er fört fyri longu nú at peika út ávísar blokkar - teigar - á føroyskum øki av áhuga, sigur James Efstathiou, at ein stórur partur av oljufeløgunum er ikki førur fyri nú at peika út ávísar blokkar, har teir kunnu siga við vissu, at hetta er staðið tey vilja bora.

Tú kanst vísa á eitt øki við kanska 10 til 20 teigum og siga, at hetta er tað, sum vit fara at bjóða uppá.

James Efstathiou sigur, at enn er neyðugt við kanning um fyri at feløgini kunnu siga júst, hvar tey vilja arbeiða.

Hvat viðvíkur áhugaverdum økjum á føroyska landgrunninum, so heldur hann, at økini, sum hava størsta áhuga, liggja í einum landssynningi úr Føroyum. Hann heldur, at økini longur norðari hava minni áhuga men tað er enn ov tíðliga at siga nakað við vissu. Hetta hevur sjálvandi nógv við tjúkka basaltið at gera.

Hyggja vit eftir einum korti, so vil eg siga, at alt, sum liggur sunnan fyri 63 stig og eystan fyri Føroyar hevur áhuga. Hetta er eitt ómetaliga stórt øki, sum fevnir um meira enn 9 kvadrat.

Tá vit spurdu James Efstathiou um økini eystan fyri Føroyar og longu norðuri, har Mobil og Conoco arbeiða á djúpum vatni bretsku megin markið, eisini er við í hesum øki sigur hann, at tað gera tey.

Vit spurdu James Efstathiou, hvat er komið burtur úr Lopransboringini higartil, nú Norsk Hydro er við har?

Hann sigur seg ikki kunna siga nakað, men kann upplýsa, at arbeiðið hevur gingið seinni enn ætlað, men hvat viðvíkur úrslitinum, so heldur hann tey vera áhugaverd.

Kvinnuhúsið

Ráðgevingin hjá Kvinnuhúsinum er opin hvørt hoskvøld frá kl. 19.00–21.00, inngongd hjá KFUM Oman Pisuvarðe 2, ella á tlf. 17200.

Kvinnuhúsið er opið gerandisdagar frá kl. 10.00–16.30. Telefonin, 17200, svarar hvønn dag frá kl. 10.00 fyrrapart til kl. 7.00 á morgni.

Fleiri skip hava ligið á reiðuni í seinastuni. Alexa úr Kingstown er eitt teirra (Mynd: Kalmar)

Alexa ligið síðani 13. september, fer avstað í dag

Síðani 13. september hevur stóra skipið Alexa, sum er skrásett í Kingstown, skiftivís ligið á reiðuni, og við bryggju. Skipið sum er eitt stórt frystiskip, hevur tikið ímóti makreli. Tvey skip hava higartil umskipað makrel umborð á Alexu, tað fyrra var eitt fremmant skip sum okkum ikki hevur eydnast at fáa navnið á. Seinna skipið ið umskipaði til Alexu, var Orcades Viking, hetta er gamli Heygadrangur. Ætlanin var annars at eitt skip afturat skuldi koma, men hetta var avlýst, ti er ætlanin at Alexa skal fara avstað aftur í gjár.

Fleiri onnur skip hava eisini ligið á reiðuni, hetta er alt russisk skip, sum hava, og fara at umskipa svartkjaft til eitt russiskt móðurskip ið liggur har.

Tað er skipafelagið Føroyar ið umboðar tey russisku skipini í Føroyum. Árni Dam frá skipafelagnum sigur, at teir hava fingið fráboðan um átta skip afturat, sum skulu koma á Havnina at umskipa svartkjaft. Hesi átta skipini eru øll frá sama reiðarí, nevniliga Arghangelsk Trawler Fleet. Árni Dam sigur viðari, at tað skjótt kann verða talan um fleiri skip, men fyribils er avtala gjørd um hesi átta. Umframt tey átta skipini, ið skulu umskipa svartkjaft, er eitt skip sum kemur á Havnina við 400 tonsum av toski til Kanada. Hesin toskurin verður fluttur uppí bingjur á bryggjuni áðrenn hann fer víðari. ∩

111.000 tons av svartkjafti fiskaði

Útlendsk fiskiskip hava fiskað 149.000 tons undir Føroyum, níggju teir fyrstu mánaðarnar í ár.

Ikki óvantað er tað Russland sum stendur fyri ti størsta partinum. Russisk skip hava fiskað 93.000 tons higartil í ár. Størsti parturin, 73.000 tons, er svartkjaftur. Næst eftir svartkjaftin kemur makrelur. Russisk skip hava fiskað smá 20.000 tons av makreli. Umframt hetta, so hava skipini eisini fiskað 234 tons av sild, 59 tons av upsa og 33 tons av rossamakreli.

Norsk skip hava fiskað smá 18.000 tons. Størsti parturin av ti, ið normenn hava fiskað, er eins og hjá russarum, svartkjaftur. Góð 32.000 tons eru fiskaði av svartkjafti higartil. Umframt svartkjaft so hava normenn eisini fiskað 524 tons av toski, 2.350 tons av longu, 1.720 tons av

brosmu, 159 tons av blálongu, og 242 tons av svartkalva.

Estland er eisini ein av teimum tjóðunum sum fiska nógv á føroyskum øki. Estlendsk skip hava fyrstu níggju mánaðarnar fiskað 7.246 tons. 5.310 tons eru svartkjaftur, 1.925 tons makrelur og 10 tons kongafiskur.

Íslendski parturin av ti sum er fiskað undir Føroyum fyrstu níggju mánaðarnar er 6.866 tons. Nógv tann størsti parturin av hesum, nærri sagt 6.770 tons er sild. Tey restandi 96 tonsini er makrelur.

Nevnast kann eisini at parturin hjá ES londum einans er smá 4000 tons. Av hesum 4000 tonsunum hevur Danmark fiskað nærum helmingin, 1.890 tons, alt makrelur. Á øðrum plássi liggur Ongland við 1.078 tonsum. Síðani koma Frakland við 641 tonsum, Týskland við 230 tonsum og Holland við 120 tonsum.

Litauen hevur fiskað 254 tons, meðan Lettland sum eisini hevur loyvi at fiska við Føroyar, ikki hevur fiskað ein stert enn. ∩